Leygarkvøldið kl. 20.15:

Tom og Huckleberry Finn

Í fyrru sending vóru børnini á útferð. Tom og Becky viltust inni í holuni. Har eru tey framvegis í kvøld, men nú byrjar dirvið at vikna, tí tey finna ikki út aftur. Bygdarfólkið skipar seg kortini og fer at leita eftir børnunum.

Inni í holuni er eisini indiánar Joe. Børnini siggja hann, men Joe sær ikki tey. Tom og Becky finna útgongdina, men so heppin er indiánar Joe ikki.

Eftir hesa sending fara Tom og Huck á skattajakt í holunum, og hesaferð gongst betur. Teir finna skattin og nú er útlit til, at Huck at enda kann fáa eitt heim hjá einkjuni eftir Douglas og systir hennara Miss Watson, sum so fegin vilja taka Huck til sín. Hetta er tó ikki nakað, sum Huck heldur vera eitt gott hugskot, og hann fær trælin hjá Miss Watson, sum eitur Jim, at hjálpa sær.

Leygarkvøldið kl. 21.55:

Waylon Jennings er country og western sangari. Upptøkurnar til hesa sending eru gjørdar í Stockholm konserthúsinum

sjónvarp

Leygardagin 8. september

19.30 **Tom Sawyer og Huckleberry Finn**
20.15 **Spenningur í Singapore** (6)
21.05 **Síðstu buskmenninir** (6)
21.30 **Dýrið í royndarglasinum**
21.55 **Waylon Jennings**
22.55 **Heimsins vánaligastu vertir**
23.25 **Liðugt**

Sunnudagin 9. september

15.00 **Sibelius og Isaac Stern**
15.35 **Hvítusunnusamkoman**
19.30 **Cirkus**
20.10 **Skapa tær**
20.25 **Drúgva ferðin**
22.00 **Í dansi** — ein SV-leikur
22.50 **Andakt**
22.55 **Liðugt**

Leygarkvøldið kl. 20.15:

Spenningur í Singapore

Yataki er samurai kríggsmaður, sum øll eru bangin fyri. Hann stuðlar japanesum í at fáa tamarhaldið í Malaya. Yataki og hansara menn ræna og ræða í teimum smáu landsbygdunum, sum hoyra til Datsuer fólkaslagið. Samurai kríggsmaðurin hevur júst sett eld á eina landsbygd, tá Frank Buck kemur framvið. Frank og Ali hjálpa at basa eldinum og høvdingurin sigur Frank frá Yatakis og hansara harðrendu framferð.

Afturkomin til Singapore, roynir Frank Buck at sannføra mydugleikarnar um, tað sum hendur í frumskóginum.

Leygarkvøldið kl. 21.30:

Dýrið í royndarglasinum

Djóragranskarin Steen Willadsen hevur vunnið sær altjóða heiður, tá hann í gransking síni hevur fingið eina gitna eggkyknu at býta seg sundur á tann hátt, at hann nú er førur fyri at gera eitt dýr, sum hevur fleiri foreldur. Hóast tað ikki er rætt, so hevur verið tosað um, at hetta eisini kann gerast við menniskjum sum grundarlag. Steen Willadsen hevur tó ongar ætlanir um at nýta uppfinning sína á menniskju, — hann arbeiðir fyri tað mesta við seyði, geitum og kúm. Gransking hansara er grundað størri vitan um nær og hvussu einstøku kyknurnar í einum gitnum eggi gera av, hvat tær skulu verða. Við royndum sínum hevur hann megnað at gera dýr, sum eru t. d. hálvt seyður og hálvt geit og sum eisini hava í sær fyribrygdi hjá kúgv eins og tey eru kall- og kvennkyn samstundis. Hesi dýr eru øðrvísi, tí tey hava øll fýra foreldur, sum í hvørjari dýraætt sær mynda úrslitið.

Sunnukvøldið kl. 22.00:

Í DANSI — irskur sjónvarpsfilmur.

Hetta er fyrsti útlendski sjónvarpsfilmurin, sum hevur fingið føroyskan tekst.

Tað eru næmingar á læraraársskeiðnum á Fróðskaparsetrinum, sum hava umsett.

Í krepputíðini í 50unum í Írlandi fóru nógv fólk av landinum. Drongurin hjá Bridies var ein teirra.

Brides umsitur nú bóndagarðin fyri gamla pápa sín, og leygarkvøld fer hon í dans . . .